Stjórin í oljuhavnini Sullom Voe:

# -Fantastiskt fyri okkum um føroyingar finna olju

OLJURÁÐSTEVNA, LERWICK
Jan Müller
jan@sosialurin.fo




*Stjórin í Sullom Voe, Gunther Newcome heilsar uppá Eyðun Elttør á oljuráðstevnuni*
*Mynd: Jan Müller*

Ikki bara føroyingar eru spentir, tá talan er um at finna olju á landgrunninum. Eisini grannar okkara í Hetlandi bíða í spenningi og seta vónir til, at olja verður funnin. Hetta kom týðuliga til sjóndar á oljuráðstevnuni í Lerwick í farnu viku. Ein av teimum er stjórin á risastóra oljuterminalinum Sullom Voe, Gunther New combe. – Tað hevði verið fantastiskt fyri okkum, um tit funnu olju. Tað hevði kunnað gagnað báðum londum. Tá eg byrjaði í mínum arbeiði fyri tveimum árum síðani var ein sendinevnd úr Føroyum við 30 fólkum og vitjaði Sullom Voe. Eg haldi tey vóru sera væl nøgd við oljustøðina her. So finna tit olju er tað frálíkt fyri tykkum, og ætla tit at brúka Sullom Voe er tað frálíkt fyri okkum.

Gunther Newcombe sigur, at sjálvandi er tað ein avgerð, sum føroyingar mugu taka, hvar føroysk olja skal flytast. –Vit hava sera stóra orku og kunnu taka olju frá stórum fundum. Tað ber sjálvandi eisini til at byggja ein terminal í Føroyum og brúka hann umframt at brúka Sullom Voe. Tað veldst so eisini um, hvussu nógv olja verður funnin. Fara tit at byggja tykkara egna oljuterminal, so kunnu tit sjálvandi læra av okkum royndum, meg eg skal ikki dylja, at okkum hevði dámt best, at tit lótu alla oljuna til Sullom Voe, nú tá oljuhavnin liggur so stutt frá møguligum føroyskum oljufundum, og nú henda íløgan longu eru gjørd.

Sullom Voe er størsta oljuhavnin í Europa. Virksemi er munandi minni enn tað var í 80-árunum og kunnu teir taka ímóti 1 milliónum tonsum aftrat um dagin.

Gunther Newcombe sigur eisini, at hóast Sullom Voe eisini merkir minkinga í oljuframleiðsluni, so sær hann kortini stórar møguleikar, nú BP hevur gjørt av at byggja út risastóra Clairfeltið, sum goymir 2,5 milliardir tunnur av olju. Tann útbyggingarætlanin, sum er í gongd og sum er mett at kosta einar 7 milliardir krónur, fer bert at troyta 10% av samlaðu goymslunum í Clair, so tey á Sullom Voe hava bjartar vónir, hóast niðurgongdina í løtuni, tí ætlanin er eisini at fara undir útbygging 2 og 3 á Clair. Tað er longu løgd rørleiðing frá Clair til Sullom Voe, so Clair fer at fáa sera stóran týdning fyri oljuhavnina í Hetlandi.

Gunther Newcombe er sjálvur jarðfrøðingur og hevur arbeitt hjá BP. Hann hevur eitt nú arbeitt við Suilven feltinum, sum liggur beint við markið og sum er eitt lønandi fund. Tað krevur nakað av arbeiði enn fyrr enn avgjørt verður at fara undir eina útbygging.

Gunther Newcombe telist millum teirra, sum siga, at tað krevur tíð og tol til at finna olju í einum øki sum Atlantsmóti. Fyri tað um tú ikki hevur funnið nakað tey fyrstu árini, merkir ikki, at eingin olja er.

Tavish Scott, varafíggjarmálarráðharri í Skotlandi:

# Upphøgging av oljupallum kann gerast stórur ídnaður fyri Hetland og Føroyar

**Hóast føroyingar onga olju finna ella tað ganga mong mong ár til hon verður funnin, so kunnu Føroyar eins væl og Hetland fáa nógvar inntøkur og fáa nógv fólk í arbeiði í tí nýggju ídnaðargreinini, sum er avtøka og upphøgging av gomlum oljupallum. Hetta heldur Tavish Scott, limur í skotska parlamentinum fyri Hetland og somuleiðis varafíggjarmálaráðharri í skotsku stjórnini**

NÝGGJ OLJUVINNUGREIN
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

– Eg haldi, at Hetland kann fáa nógv burtur úr einum størri samstarvi við Føroyar, ikki bert á oljuøkinum, men á mongum økjum. Eg haldi so eisini, at okkara ídnaður og myndugleikar hava nakað av læra føroyingum, nú vit hava 25 ára royndir sigur Tavish Scott, sum ikki er so bangin fyri framtíðini hjá oljuvinnuni í Hetlandi og fyri tað á Atlantsmótinum. Hann heldur ikki, at oljufeløgini fara at rýma úr økinum fyri tað, at lønandi fund ikki eru gjørd í eina drúgva tíð. – Oljufeløgini gevast ikki, tey venda tingunum aftur og aftur fyri at finna fram til, hvussu tey skulu arbeiða og koma á mál. Hava tey mistikið seg eina staðni, so royna tey nýggjar arbeiðshættir og leiðir aðrastaðni. Tí trúgvin uppá at olja er í økinum drívur verkið og fær tey at halda fram. At tað hevur gingið skeiva vegin í eitt ár fær tey ikki at gevast. Eg trúgvi heldur ikki, at oljumálaráðharri og týðandi umboð fyri BP fóru á røðarapallin her og tosa um møguleikarnar fyri at gera fund í økinum, um teir ikki mettu møguleikarnar at vera tilsteðar.

Tavish Scott sigur, at hetlendingar vóru sera fegnir, tá tað fréttist, at BP fór undir at byggja út risastóra oljufeltið Clair, sum hevur ligið í dvala síðani tað var funnið í 1977. Sum vararáðharri í Skotlandi leggur hann eisini stóran dent á, at øll útbygging av oljufeltum á Atlantsmótinum fer fram við fyriliti fyri umhvørvinum. Eisini soleiðis at henda útbygging ikki nervar fiskivinnuna, sum framvegis er tann mest týðandi vinnugreinin í Hetlandi.

Tavish Scott vísir annars á, at fiskivinna og oljuvinna hava megnað at livað lið um lið øll hesi árini. Fiskivinnan hevur latið mong før til uppgávur í oljuvinnuni og er partur av ágóðanum frá oljuvinnuni eisini farin til at gera týðandi íløgur í fiskivinnuni. – Oljuvinna og fiskivinna kunnu virka saman men tú mást kenna tína ábyrgd, hvar tú enn er stæddu,r og tí hevur tað eisini týdning at hava ein góðan dialog millum hesar vinnur.

## Avdøka av oljupallum

Á ráðstevnuni í Lerwick varð eisini nógv tosað um avtøku/upphøgging av teimum mongu gomlu oljupallunum í Norðsjónum (Decommissioning). Innan ikki ov langa tíð verða arbeiði boðin út til at skilja sundur hesar risastóru pallar. Hetta fer at geva nógv arbeiði og hetta kann eisini gerast ein heilt nýggjur ídnaður, men tað krevur so eisini, at onkur er førur fyri at átaka sær hesa stóru og nýggju uppgávu. Tað er m.a. hetta sum hetlendingar síggja sum ein framtíðar møguleika fyri teirra ídnað.

Tavish Scott heldur eisini, at hetta kundi verið ein nýggj leið hjá føroyskum vinnulívi at gingið og møguliga kundu føroysk og hetlendsk vinnuáhugamál í felag tikið henda spurningin upp. Tað er hugsandi, at her verður so nógv at gera, at tað krevur samstarv av stóru ídnaðarfyritøkum og hví ikki í tveimum grannalondum. Hetlendingar, sum hava havt 25 ár við góðum inntøkum frá oljuvinnuni spyrja seg sjálvar, hvussu teir kunnu fáa 25 enn góð ár við inntøkum frá hesi vinnu. Og her síggja teir møguleikan fyri einum heilt nýggjum vinnuvegi, sum skal taka niður og sundur gomlu pallarnar. Tí hava teir eisini stovnað "The Shetland Decommissioning Company". Í felagnum eru bæði privatar og almennar fyritøkur, her m.a. havnamyndugleikarnir í Lerwick og Shetland Islands Council.

Sjálvur heldur Tavish Scott, at tað kann blíva talan um ein rættiliga stóran ídnað næstu 20 til 30 árini at taka hesar pallar sundur. Men tað krevur so, at onkur tekur stig á hesi leið og at tú hevur neyðugu amboðini og neyðuga umhvørvið til tess. Eitt nú djúpt vatn og góðar havnir.

Enn er so spurningurin, hvussu hetta arbeiðið skal fara fram, og her verður so eisini hugsað um trupulleikarnar við Brent Spar á sinni, har eingin vildi síggja henda gamla pallin. So tað er eisini ein spurningur, hvat umhvørvisfelagsskapir fara at siga og samtíðis, hvussu langt man vil fara við teimum gomlu pallunum, hvat bæði trygd og møguligari dálking viðvíkur.

## Fólkatalið minkar

Hóast tað hevur gingið væl í vinnulívinum leingi, so gongur tað minni væl við burðartalinum. Í dag eru umleið 22.000 íbúgvar í Hetlandi og hagfrøðiliga gongur talið tann skeiva vegin. – Tí hevur tað eisini so stóran týdning fyri okkum, at eisini føroyingar finna olju og møguliga vilja flyta hana til Hetlands, og tað hevur eisini nógv at siga, at oljumenningin heldur fram norðan og eystan fyri oyggjarnar. Eisini ein nýggjur ídnaður sum avtøka av oljupallum er sera týðandi, tí hann kann hava við sær, at nógv fólk flyta henda vegin at fáa arbeiði. Hetta hendi eisini í 70-unum, tá arbeiðsfólk steymaðu til Hetlands at vera við í uppbyggingini av oljuvinnuni. Eg hevði fegin viljað sæð, um ikki eitt so stórt "boom", so tó eitt miniboom í sambandi við avtøku av oljupallum sigur vararáðharri fyri fíggjarmál og almennar tænastur í Skotlandi, Tavish Scott við Sosialin.



Alex Kemp, professari á Robert Gordon University:

# Føroyingar mugu umhugsa treytir til oljufeløgini

OLJURÁÐSTEVNA Í LERWICK
Jan Múller
jan@sosialurin.fo



*Alex Kemp, professari saman við Eyðun Elttør, oljumálaráðharra*

Tá føroyingar fyrireikaðu 1. útbjóðingini seint í 90-árunum var sera umráðandi at fáa karmarnar rætt skipaðar bæði fyri at kunna draga oljufeløgini til øki men eisini fyri at tryggja føroyska samfelagnum rímuligar og rætta inntøkur av oljuframleiðsluni. Fyri at finna ta so gyltu javnvágina vórðu boð send eftir tí høgtmetta professaranum á Robert Gordon University, Alex Kemp, sum er ein av teimum royndastu lærdu innan oljubúskap yvirhøvur. Nú føroyingar fyrireika sína næstu rundu og bretar um sama mundið eru við at tilrættaleggja sína 22. rundu spurdu vit Alex Kemp, sum helt fyrilestur á oljuráðstevnuni í Lerwick í farnu viku, hvørji ráð hann hesaferð hevur at geva føroyingum fyri at varðveita áhugan hjá oljufeløgini fyri at bjóða í eini nýggjari útbjóðing.

– Eg haldi meg ikki føran her og nú at geva góð ráð, men tað er greitt, at man fyrst og fremst má taka við læru av tí vitan og royndum man hevur frá tí fyrstu útbjóðingini. Tit hava borað fýra brunnar uttan stórvegis eydnu, so ein verður noyddur at staðfesta ta sannroynd. Men hinvegin eru oljuprísirnir hækkaðir og nýggj vitan er fingin til vega. So ein má endurskoða jarðfrøðiligu viðurskiftini og møguleikan at finna olju, tá føroyskir myndugleikar ætla sær at bjóða út nýggj øki. Aftrat hesum kemur eisini, at tað framvegis eru brunnar eftir at bora í 1. útbjóðing. Í ljósinum av hesi vitan má man so gera sær greitt, hvør prospektiviteturin er, og síðani at gera sær tankar um búskaparliga karmin út frá ymsum oljuprísum. Og so má man gera reglurnar út frá hesum karminum. Tvs. hvat man fer at krevja av oljufeløgunum í teirra arbeiðsskráum, hvønn oljuskatt man áleggur teimum at gjalda osfr.

– Men metir tú út frá hesum sannroyndum, at myndugleikarnar verða noyddir til at linka krøvini og gera reglarnar léttari hjá oljufeløgunum at virka her?

– Búskaparligu reglurnar, sum eru royalty, oljuskattur ol.mugu endurspegla, hvussu áhugaverd økini eru. Og vitandi, at úrslitini higartil ikki hava verið so góð, so mást tú eisini taka við læru av teimum og harvið møguliga eisini modifisera reglarnar.

Alex Kemp vísir á, at úrslitini av leitingini í bretska partinum av Atlantsmótinum hava ikki verið góð heldur. Økið verður framvegis mett sum sera "frontier" tvs. fjarskotið og ókent. Við seinastu útbjóðing vestan fyri Hetland linkaðu myndugleikarnar um treytirnar, soleiðis at tær vóru øðrvísi og betri enn tær í Norðsjónum. Eg veit ikki, hvørjar broytingar myndugleikarnir fara at gera í sambandi við 22. Útbjóðing í næsta ár, men tað er sannlíkt, at teir fara at staðfesta, at úrslitini tey seinastu 7 til 8 árini hava ikki verið nóg góð.

Alex Kemp staðfestir, at hóast úrslitini hava verið í lakari lagi, so er áhugin kortini fyri at leita á Atlantsmótinum. Ymisk feløg hava ymsar jarðfrøðingar metingar og eg giti, at hetta er eisini so á føroyska landgrunninum. So vónandi verður tað framvegis áhugi fyri at bjóða á øllum Atlantsmótinum.

Royndi prosesssarin úr Aberdeen vísir annars til leiting aðrastaðni, sum tók drúgva tíð, áðrenn nakað varð funnið og sipar her m.a.til Nigeria, har tað vóðru boraðir heilt nógvir brunnar í mong ár, áðrenn nakað veruligt fund varð gjørt. Og eftir sera langa tíð varð eitt stórt fund gjørt og tað er so hildið fram.

So tað er alt alt ov tíðliga at gera sær ta niðurstøðu, at føroyski landgrunnurin ikki goymir olju. So tær nýtist tol. Tú kanst blívar yvirraskaður, báðar vegir. Sjálvur haldi eg tað er ein góður møguleika at gera lønandi fund á føroyskum øki.

Uppá fyrispurning um tað er óheppið at útbjóðingar eru í føroyskum og bretskum øki á Atlantsmótinum um somu tíð sigur Alex Kemp, at tað eru plussir og minussir við tí. – Um bæði økini eru tøk, so kundi tað fingið fólk at hugt at øllum økinum undir einum. Jarðfrøðingar hyggja nevniliga at føroyska og bretska landgrunninum sum eitt øki. Tað er eitt pluss. Hinvegin hava oljufeløgini avmarkað budgett, og tey mugu kanska til at velja millum føroyska og bretska økið. Tað kann vera óheppið.

– Eitt gott og lønandi oljufund á føroyska ella bretska landgrunninum fyri tað fullkomiliga broytir støðuna leggur Alex Kemp aftrat.

Hjarnar Djurhuus, føroyskur BP-stjóri:

# Mugu gera hvat tænir Føroyum

OLJURÁÐSTEVNA Í LERWICK
Jan Müller
jan@sosialurin.fo




*Hjarnar Djurhuus, stjóri hja BP í Føroyum her á ráðstevnu í Lerwick saman við oljumálaráðharranum Eyðun Elttør*
*Mynd: Jan Müller*

Tað vóru BP og myndugleikarnir í Hetlandi, sum skipaðu fyri oljuráðstevnuni í Lerwick í farnu viku. Úr Føroyum vórðu umboð fyri Oljumálaráðið við sjálvum oljumálaráðharranum á odda, umborð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, fyri Atlantsflog og Vinnuhúsið. Stjórin hjá BP í Føroyum, Hjarnar Djurhuus, sum tók sær av tí føroyska ferðalagnum, er nøgdur við túrin og vónar, at oljuráðstevnan, sum varð hildin í sambandi við, at tað eru 25 ár síðani, at Sullom Voe oljuhavnin varð tikin í brúk, er til gagn fyri bæði Hetland og Føroyar. Hann heldur tað er skilagott at hava eitt gott samstarv.

Hyggja vit at samfeløgunum Føroyar og Hetland, so kann tað tykjast sum vit í fyrstu syftu líkjast nógv, Teir hava 17 bygdar oyggjar eins og vit. Men so eru vit ikki eins meira. Tað at vit eru ein nógv meira sjálvstøðug tjóð ger okkara land so nógv øðrvísi enn teirra. Vit hava heilt øðvísi møguleikar at bjóða tí unga fólkinum, bæði í sambandi við arbeiði og útbúgving. Tað er m.a. tí, at okkara fólkatal veksur, meðan teirra hevur hug at standa í stað ella fella. Og so kemur hartil, at teir liggja tætt við eitt størri land. Nógv av tí unga fólkinum, sum m.a. fer til Skotlands, kemur ikki aftur.

Hvat oljuinntøkunum í Hetlandi viðvíkur, so sær tað út til, at oljupengarnir ikki fara at streyma inn í samfelagið eins nógv sum higartil. Í hesum førinum kann man so siga, at støðan hjá teimum og okkum líkist, nú tað enn ikki hevur eydnast okkum at fáa inntøkur frá oljuni.

– Eg skilji væl, at hetlendingar bjóða seg fram við Sullom Voe nú tann íløgan er gjørd og støðin liggur har og kann taka ímóti nógv meiri olju enn í dag. Men vit hava so eina lóg, sum sigur, at finna vit olju, so skal hon upp í Føroyum. Hjarnar Djurhuus heldur tó, at finna vit bert minni nøgdir, so vil man nokk hyggja at, um tað er tað rætta. Og tað sum man vil gera er tað, sum tænir tí føroyska samfelagnum best.

Man má ikki bara hyggja at krónum og oyrum, men eisini at umhvørvinum. Er tað skilagott. Metingin man ger má vera, hvat tænir føroyska samfelagnum best.